Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Føroysk og donsk áhugamál á uttanríkispolitiska økinum

Spurningar:

1. Metir løgmaður, at Danmark og Føroyar hava somu áhugamál, tá tað ræður um uttanríkispolitikk?
2. Metir løgmaður, at Danmark og Føroyar hava somu áhugamál, tá tað ræður um handilspolitikk við umheimin?
3. Metir løgmaður, at Danmark dugir betur at røkja føroysk uttanríkispolitisk og handilspolitisk áhugamál, enn Føroyar sjálvar?
4. Veit løgmaður ella er løgmaður kunnaður um, hvørt ætlanin er at styrkja danska uttanríkismálaráðið ella forsætismálaráðið, tá tað ræður um føroysk viðurskifti?

Viðmerkingar:
Danski uttanríkisráðharrin hevur í januar í ár kunnað Udenrigspolitisk Nævn hjá danska Fólkatinginum um ætlaðu strategiina hjá dønum á uttanríkisøkinum komandi árini.
Í ætlanini um uttanríkis- og trygdarpolitisku strategiina stendur m.a. ”Derfor skal dansk udenrigs- og sikkerhedspolitik fremover sætte kurs efter et værdipolitisk kompas. Så vi ved, hvad vi kæmper for. Hvem vi kæmper med. Og hvad vi kæmper imod. Sådan fremmer vi bedst danske interesser i en verden uden faste holdepunkter.”
Eisini stendur: ”Endelig skal indplaceringer fra Grønland og Færøerne fremme en udenrigstjeneste for hele rigsfællesskabet”
Dentur verður lagdur á at styrkja donsk áhugamál. Søgan hevur tó víst, at føroysk og donsk áhugamál ikki altið eru tey somu.
Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum verður hesin spurningur settur løgmanni.

Á Løgtingi, 1. februar 2022

Beinta Løwe Jacobsen